inni - trygt og ómaksleyst til hús

Sethús – Argjavegur 38, Argir

Húsini er í 2 hæddum á 48 fermetrar - í alt 96 fermetrar. Grundøkið er 259 fermetrar. Byggiárið er 1950-51, men húsini eru nýmótansgjørd í 80'unum og 90'unum. Í erva er inngongd, durur, alrúm / borðstova / stova og køkur. Í neðra er inngongd, trappugongd, gongd, vaskirúm, baðirúm og 2 kømur. Húsini eru snøgg, væl hildin og í góðum standi. Væl hildin garður er uttan um húsini. Tey standa í veðurgóðum og hugnaligum umhvørvi nær býnum. Prísuppskot: kr. 1.500.000,00.

Sethús – Torbjarnargøta 6, 512 Norðagøta

Húsini eru í 2 hæddum á uml. 60 fermetrar - í alt 120 fermetrar. Í niðastu hædd er sjálvstøðug íbúð. Grundøkið er 659 fermetrar. Byggiár: 1990. Í erva er gongd, baðirúm, køkur / stova og 2 kømur. Í neðra er durur, stova, kamar, gongd, baðirúm, køkur og vaski- / fýr- / kjallararúm. Húsini standa ovarliga í bygdini og hava gott útsýni yvir bygdina. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

Sethús – undir Heygnum 6, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum á 75 fermetrar í alt 150 fermetrar - alt innrættað. Grundøkið er 401 fermetrar. Byggiár: 1965. Í erva eru køkur, stova, 2 kømur, baðirúm, gongd og trappugongd. Í neðra eru 3 kømur, baðirúm, vaski- / fýrrúm, goymslurúm, gongd, durur og hjallur. Húsini standa í barnavinarligum, friðarligum og veðurgóðum umhvørvi og hava gott og frítt útsýni. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni

inni - trygt og ómaksleyst til hús

Handilsbygningur í miðbýnum í Klaksvík

Bygningurin er í 2 hæddum á 120 fermetrar. Byggiár 1939. Í niðaru hædd eru handilshøli, goymslurúm, køkur, wc og fýrrúm. Í ovaru hædd eru handilshøli, skrivstova og goymslurúm. Møguleiki er fyri at keypa vørulagrið. Bygningurin stendur sera væl fyri í miðbýnum í Klaksvík og kann nýtast til bæði skrivstovu og handil. Prísuppskot kr. 3.500.000,00.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni

STARVSLÝSING

Blandimeistari

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi blandimeistara til asfaltverkið í Hundsarabotni at byrja skjótast gjørligt. Asfaltverkið hevur um hendi asfaltframleiðsluna hjá Landsverki.

Arbeiðsuppgávur

Sum blandimeistari hevur tú ábyrgdina av:
- Dagliga rakstrinum av asfaltverkinum saman við formanninum í Hundsarabotni, herundir planlegging av arbeiðnum
- At skipa fyri viðlíkahaldi av verkinum, herundir eisini fyribyrgjandi viðlíkahald
- Samskiftinum við kundar

Í tíðarskeiðnum apríl til november, tá ið asfalteringin fer fram, kann roknast við longum arbeiðsdøgum. Roknast kann við, at tú skalt luttaka í øðrum arbeiði í Hundsarabotni ein part av vetrarhálvuni, tá ið asfaltverkið liggur stilt.

Upplæring í at reka asfaltverkið verður í Hundsarabotni.

Førleikakrøv

Sóknast verður eftir fólki við handverkaraútbúgving t.d. maskinsmiður, ella aðrari viðkomandi útbúgving. Tú hevur góð samstarvsevni, skal duga at skipa títt arbeiðsøki og geva títt íkast til menning av arbeiðsplássinum, umframt vera førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

Harumframt skalt tú hava áhuga fyri at arbeiða við KT. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir við at arbeiða við Excel-rokniarki og Word-tekstviðgerð.

Setanarviðurskifti

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Starvið er fastlønt.

Umsóknir

Umsóknir skulu sendast til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn,

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. oktober, 2006. Merk umsóknina "Umsókn blandimeistari" og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Friðjón Jacobsen, formann, á fartel. 540 960 ella Torkil Olsen, deildarleiðara, á fartel. 540 841.

REPROZ

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.

mbf

Í samband við, at MBF verður 25 ár tann 24. oktober, verður stórt hátíðarhald í Norðurlandahúsinum kl. 13.00 - 16.00 við hesi skrá:

"Handikappolitikkur - í søgu og framtíð"

Formaðurin í MBF, Leila Solmunde, bjóðar vælkomin.

Løgmaður, Jóannes Ejdesgaard, setur dagin.

Doris Hansen, høvundur av bókini *"Søgan um hini"*:
"Brekað í Føroyum, søguliga sað".

Tónleikur

Jógvan Fríðriksson, prestur:
"Brek sað við einum skálkabrosi"

Stuttur steðgur

Holger Kallehauge, fyrrverandi landsrættardómari í Danmark:
"ST. konventiónin: Rættindi teirra brekaðu í søgu og framtíð"

Tónleikur

Formaðurin í MBF, Leila Solmunde, endar.
"Bóklingurin um atkomu verður tikin í nýtslu"

Ábit

Elin Winther Poulsen er orðstýrari.